Gott vikuskifti

lesarabrøv

Onkur fjølmiðlaummælari helt fyri stuttum í Sosialinum, at tað var løgið, at útvarp og sjónvarp skuldu ummælast. Hví skulu bløðini ikki ummælast, tá alt skal ummælast. Í bløðunum er nógv skapandi.

Vælskrivaðir tekstir. Gott lay-out. Góðar myndir og viðhvørt tekningar — ella aðrar illustratiónir.

Hetta er kortini ikki nakað ummæli. Bara eitt lítið rós frá einum trúgvum lesara. Eitt rós til hd fyri seinasta Vikuskiftið — iskoyti í Sosialinum. Og nakrar leysligar viðmerkingar.

Takk fyri at Vikuskiftið kom aftur eftir blund í nógv ár. Vælsignaðir, latið hd fáast við hetta burturav eina tíð. Frálíkt. Ein fjølbroytt dagdvølja í vikuskiftinum. Væl skrivað og *stutt* skrivað.

Stutt skrivað sammett við epistlarnar hjá blaðstjóranum, men teir skal eg venda aftur til seinni.

Hampiliga væl sett upp. Mótvegis restini av blaðnum, sum er ein ókristiligur hurlivasi. Man skuldi ikki trúð, at tað vóru útbúgvin tíðindafólk og avlærdir prentarar, sum settu blaðið — nógv tað frægasta í Føroyum — upp.

»Vikuskiftið« skuldi bara verið framerkt týðuligari. T.d. við øðrum slagi av yvirskriftum. Ella við t.d. leysari margu í høgru síðu.

Harafturat hevði kanska verið ynskiligari við størri royndum við myndunum. Tit hava jú ein óføran myndamann. Men tit spæla tykkum ikki við myndum. Hvørki í spennandi kutum. Serligum sniðum í samljóð við yvirskrift og tekst. Tit hugsa ikki nóg ofta, at ein blaðsíða eisini kann vera ein listarlig heildarmynd.

Opnusamrøðan var góð. Vónandi kann Sosialurin hava eina størri samrøðu hvønn leygardag. A la tær, sum Dagny gjørdi fjørsummar.

Vikuskiftið, eitt frálíkt tiltak, og gott úrslit.

Ætli ikki at koma inn á tíðindaflutningin í hesum lesarabræv, men bara rósa tykkum við hasum greinunum um avleiðingarnar fyri sjúkrahúsverkið.

Tær standa høgdar í relieff, í basalt, við deyðatøgnini í 14. September sum kontrast.

Yvirskriftin í blaðnum hósdagin var tó óluksáliga »langt úti«. Hon minnir meg mest um: *Fór ein maður upp á Arnatind í Tindhólmi og tráðkaði skeivt, so var hann:* OMANDOTTIN!

(Yvirskriftin í Sosialinum var: *Undantaksstøða á Landssjúkrahúsinum í summar. Sjúklingar fara helst at rópa:* NEYÐARRÓP).

Óprofessionelt.

Líka so óprofessionellar, sum oddagreinirnar, tá blaðstjórin ikki ger annað enn tøvir aftur og fram, og sigur tað sama upp í saman, og kanska slettis ikki sigur tað, hann upprunaliga ætlar at siga.

Um blaðstjórin heldur, at dygdin og »slagkraftin« í oddagreinini er identisk við longd, so hevur hann misskilt alt um lesivanar hjá fólki.

Dugi ikki at skilja, hví blaðstjórin á hesum annars so fræga blaði *ikki* vil hava allar lesararnar at lesa oddagreinirnar.

Eitt má blaðstjórin gera sær greitt, og tað er, at bara eitt fátal lesur hasar greinirnar, sum jú eru longri enn leiðararnir í Information ella Weekendavisen. Teir eru heimsins longsu hesumegin fyrrverandi jarntjaldið.

Og nakað heilt annað er, at hatta er ikki ein oddagrein — tá tað eru hálvar ella heilar síður. Hatta er ein viðmerking, politisk viðmerking ella okkurt tílíkt.

So góði blaðstjóri, avmarka næstu oddagreinina til eitt ella hálvannað A4-ark, so tíma fólk at lesa oddagreinina.

At enda fari eg sum lesari at takka fyri, at tit løgdu til brots at geva blaðið út 5 ferðir um vikuna. 14. September gjørdi tað fyrst í sjeytiárunum, og blaðið fekk góða undirtøku. Tað var tað næststørsta í Føroyum við 3500 til 4000 eintøkum og tað hevði fingið uppaftur størri undirtøku, um ikki flokspolitikkurin alt ov ofta troðkaði tíðindini burtur av forsíðuni. Gerið tit ikki sama mistakið.

Vónandi eydnast tað hjá tykkum á Sosialinum at halda fram við dagligari útgávu eftir royndartíðina.

Men eg ivist ikki í, at tit skulu »dubba« tykkum uppaftur meira. Vera friskari, lættari, finna fleiri »solo-søgur« og duga at selja tykkum betur við eini meira spennandi og beinraknari forsíðu.

Umframt at sláa fast við 7-tumma seymi í tilvitanina á fólki — eisini hjá teimum, sum bara lesa Dimmu og halda, at hon er tann einasta avísin á klettunum — at Sosialurin hevur fleiri ferðir so nógv tíðindi sum Dimma og nógv betri tænastutilfar. T.d. føðingar, veðurtíðindi, streymyvirlit, yvirlit yvir andlát, andakt, málteig, skemtitekning o.s.fr.

Men hetta selja tit bara ikki. Ella ikki nóg væl. Og at duga at selja eina javntgóða og støðuga avís er lykil til framburð, plagdi gamli blaðstjórin á Morgenavisen Jyllands Posten, Laust Jensen, at siga. Og framburð hevur Jútlandsposturin havt. Frá at vera ein minni provinsavís er hon størsta sunnudagsblaðið í Danmark í dag og næststørst gerandisdagar, tá vit ikki rokna lættisopparnar BT og EB uppí. Í dygd áttu tit fyri langari tíð síðani at havt tikið Dimmu!

Lesari

†

Sagt verður frá, at okkara góði, elskaði

KARSTEN HOYDAL

andaðist tann 4. apríl 1990, 78 ára gamal.

Marie Louise
Egil, Kjartan, Gunnar, Annika
Ulla, Gunvør, Jette
ábbabørnini og langabbabørnini

Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju sunnudagin 8. apríl kl. 16.

FØROYA HANDILSSKÚLI

Treytað av myndugleikagóðkenning søkir Føroya Handilsskúli eftir

Lærarum og tímalærarum

frá 1. august 1990 til skúlarnar á Kambsdali og í Tórshavn.

Lærugreinir á Handilsskúlanum á Kambsdali:
Rokning, bú- og roknskapur, samfelagslæra, føroyskt, danskt, enskt og týskt, franskt, møguliga spanskt, støddfrøði, søla og tænasta, teldulæra, maskinskriving, etv og samskifti, fiskivinna, vinnulív og samfelag á FHS-støði.

2. parts FHS-skeiðini í »fyrisitingartøkni« og »skrivstovuyrki yvirhøvur« og harafturat skeið, sum skúlin fer at hava.

Teldulæra, roknskaparlæra /rakstrarbúskapur, føroyskt, danskt, enskt, týskt, fiskivinna, fyriskipan við samskifti, støddfrøði, uttanlandshandil, vinnulívsrættur, samfelagsbúskapur og samtíðarsøga á HH-støði.

Lærugreinir á Handilsskúlanum í Havn:
Samfelagslæru, støddfrøði, søla og tænasta, teldulæra, maskinskriving, etv og samskifti, fiskivinna, bú- og roknskapur, enskum og týskum á FHS-støði.

2. parts FHS-skeiðini í »fyristingartøkni« og »skrivstovuyrki yvirhøvur« og harafturat skeið, sum skúlin fer at hava.

Teldulæra, roknskaparlæra/rakstrarbúskapur, danskt, týskt, fiskivinna, fyriskipan við samskifti, uttanlandshandil, vinnulívsrættur og samtíðarsøga á HH-støði.

— — —

Førleikakrøv: Hægri útbúgving, handilsháskúla, lærdan háskúla, handilsfaklæraraprógv ella onnur við øðrum fortreytum, og sum ætla at taka handilsfaklæraraprógv. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

Setanarkor: Sambært kunngerð kenslumálaráðsins frá 31. mars 1987, eftir avtalu, ella sum tímalærari.
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum fær starv, má vera til reiðar skjótast gjørligt at taka ta eftirútbúgving — tað veri seg handilsfaklæraraprógv ella aðra førleikagevandi útbúgving — sum er neyðug fyri at verða sett/ur í fast starv.
Eisini mugu viðkomandi rokna við í ávísan mun at skula undirvísa á fleiri stigum og partvís um kvøldið um neyðugt.

Løn: Í lønarrensli 13/21/24, 18/26/29, 16/21/29/31 ella eftir avtalu.

Umsókn: Umsókn til fast lærarastarv skal við ljósprentum av prógvskjølum o. ø. stílast til Landsskúlaráðið og verða øðrum skúlanum í hendi 10. apríl 1990.
Umsókn til tímalærarastarv skal stílast og sendast til tann skúlan, ið umsøkjarin ætlar at arbeiða á.

Leyst at søkja: 15. mars 1990.
Galdandi til 10. apríl 1990.

FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
FR-110 Tórshavn

FØROYA HANDILSSKÚLI
Kambsdalur
630 Fuglafjørður

Á Føroya Handilsskúla fevnir frálæran um fhs-støðisárið, fhs 2. part, hægri handilsskúla, stakroyndir, merkonom, datanom, hmx, hd 1. part, banka- og sparikassaskúla og útboðin umbiðin skeið.

Lýsið í **sosialinum**